## út at koyra



### BMW 2002 í 2003

Væntandi kemur ein nýggjur BMW 2002 á marknaðin í 2003. Navnið, BMW 2002, er annars væl kent frá sjeytiárunum.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

### 10 mió Toyota

Í ár seldi Toyota bil nummar 10 milliónir, síðani merkið kom á europeiska marknaðin í 1963

**Kelda: BIL**

### 6 gear sum standard

Eftir ætlan verður 6 trins gearkassin standard í øllum bilunum hjá VAG-konsernini, uttan teimum minstu, sum t.d. VW Lupo og Seat Arosa.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Citroën við nýggjum C5 seinni í ár




*Tað var ikki ætlanin at hesar myndirnar , sum eru tiknar í California, skuldu koma alment fram áðrenn bilaframsýningina í Paris, men ringt er at verja seg fyri fjaldum myndatólum*



MAGNUS GUNNARSSON

Fyri tveimum árum síðani vísti FDM blaðið, Motor, tekningar av einum nýggjum Citroën, sum teir nevndu „Projekt X-40“. Bilurin skuldi koma á marknaðin í oktober 2000. Tekningarnar vóru meinlíkar hesum Citroën C5, sum her er avmyndaður í California, og verður alment sýndur fram á Paris Motorshow í oktober.

**Størri enn Xantia**
C5 skal loysa Xantia av, og møguliga eisini tann størra Citroën XM. Avgerð er ikki tikin um ein størri C6 skal koma seinni, sum avloysari fyri XM. C5 er 4.70 m langur, ið er sama longd sum XM og 18 cm longri enn núverðandi Xantia. Hóast C5 sær út sum ein sedan, er hann ein hatchback við fimm hurðum. Sum vanligt fyri teir stóru Citroën bilarnar, hevur C5 hydropneumatiska fjaðraskipanin. Hendan Hydractiv 3 skipanin hevur teldustýrt samband millum fjaðraskipanina og støddoyvararnar, sum ger at fríhæddin verður stillað í samsvar við ferðina á bilinum.

**Tøkniliga framkomin bilur**
Talan er um ein tøkniliga framkomnan bil við t.d. satellit navigatión og stillingarnar til radio og telefon, kunnu stýrast við røddini. Umframt tann umhvørvisvinarliga og orkusparandi HDI dieselmotorin, fæst C5 í luksusútgávuni við einum 3.0 litur V6 bensinmotori við 210 hk. Eftir hesum at døma, verður avloysarin hjá Xantia ein størri og fínari bilur, so spennandi verður nær hann kann væntast hendanvegin, og hvat hann kemur at kosta. Tað frætta vit óiva meira um seinni í ár.

**Kelda: FDM / Motor**



*Hóast C5 sær út sum ein sedan, er hann ein hatchback við fimm hurðum*



## út at koyra

# Føroyar við í umboðsráðnum hjá FDM

MAGNUS GUNNARSSON

Forenede Danske Motorejere, FDM, varð stovnað í 1909, nakað eftir at bilarnir komu til Danmarkar og 13 ár áðrenn fyrsti bilurin kom til Føroya. Hvussu nógvir føroyingar vóru limir tey fyrstu árini, vita vit ikki. Í 50-unum og 60-unum vóru tað ofta tey sum koyrdu uttanlands um summarið, ið vóru limir og høvdu FDM merki í kølaragittaranum á bilinum.

**FDM í Føroyum**
Limatalið hevur verið skiftandi alt eftir sum tilboðini til limirnar hava verið og hvussu limir hava merkt, at teir hava fingið nakað burtur úr limaskapinum. í 1975 var ein deild av FDM stovnað í Føroyum. Tað var Hans G. Bischoff, sum tá hevði FDM í Føroyum undir hond. Tá hann byrjaði vóru 225 føroyskir limir. Hann megnaði eftir 10 árum at fáa limatalið upp á yvir 1.100 limir. Umframt ferðaskrivstovurnar, sum eru her, hava FDM royndarstøðir eisini verið. Okkurt árið eru rullandi royndarstøðir komnar úr Danmark. Í 1986 lat Sámal Bláhamar eina royndarstøð upp í Kollfjaðradali, sum varð væl móttikin. Men tað vísti seg tó, at grundarlagið var ov lítið til, at royndarstøðin kundi bera seg, og hon mátti gevast eftir tveimum árum. Tá var limatalið komið uppá uml.1500.

**Royndarstøðirnar í Danmark**
FDM royndarstøðirnar í Danmark eru væl umtóktar og nógv brúktar. Tað, sum tær hava at bjóða er t.d. specialroynd, garantiroynd, brúktbilaroynd, umhvørvisroynd og rustverndareftirlit. Allar hesar royndir verða gjørdar til ein fastan prís av fakfólki við hollari vitan, útbúgving og fleiri ára royndum á økinum. Hetta er eitt gott tilboð til limirnar, sum kunnu spara nógvar pengar við at fara til FDM og fáa eina óhefta kanning av bilinum, til dømis áðrenn garantitíðin er úti. FDM limir í Føroyum hava møguleikan at gera brúk av hesum tilboðum, umframt at teir altíð kunnu ringja til Teknisk Service, sum hevur ein hóp av vitan um bilar og t.d. spyrja um hvørjir trupulleikar kunnu vera við einum ávísum bilmerki. Ella til Juridisk Service, har løgfrøðingar hjá FDM eru til reiðar at hjálpa limunum við rættarligum spurningum, so sum keypi og sølu, ella viðvíkjandi ferðsluóhappum. Treytin er bert, at tú ert limur, tá trupulleikarnir stinga seg upp.

**Umboðsráðið**
Til umboðsráðið, sum er ovasti mynduleikin hjá FDM, eru tað limirnir sum velja sítt umboð í ráðið at røkja teirra áhugamál har. Á seinasta fundi, sum var í mai, kom Bergur Godtfred, sum er umboðsnevndarlimur, valdur av FDM limum í Føroyum, á tal við Per Antvortskov, nýggja tekniska stjóran hjá FDM. Hann vísti seg at hava stóran áhuga fyri Føroyum, og var spentur upp á at fáa eitt samstarv í lag við føroysku limirnar. Føroyski umboðsráðslimurin fær øll tíðindaskriv frá FDM og hevur beinleiðis samband við nevnd og stjórn í felagsskapinum.



*Bergur Godtfred er umboðsráðslimur í FDM.*

**Heimasíðan hjá RFF**
Á heimasíðuni hjá RFF, undir teiginum „ Lesarin hevur orðið“ skrivar Bergur Godtfred eina grein um FDM. Hann vísir t.d. á at FDM er størsta brúkarafelag í Danmark við meira enn 211.000 limum í samtakinum. Í Føroyum eru umleið 500 limir í FDM, sum helst er einasta brúkarasamtak her á landið. Heimasíðan er aktiv, so til ber at klikkja seg inn ymiskar leinkjur, har meira fæst at vita um virksemið hjá FDM.

*Adressan til heimasíðuna er: www.rff. fo.lesarin-FDM 1.htm*




*Limablaðið hjá FDM, Motor, frá 7. september 1929. Á permuni er ein tekning av, hvussu ferjurnar um Stórabeltið fóru at síggja út í framtíðini. Hesa tíðina kom Motor út einaferð um vikuna.*